Hevur tú ein spurning ella onkran trupulleika, sum tú kundi ynskt tær at fingið viðgjordan í hesum teiginum.

Spyr Sosialin

Skriva til: Sosialurin, postsmoga 76, 3800 Argir. Merk brævbjálvan »Spyr Sosialin«.



Eyðun Joensen, sálarfrøðingur



Marjun Sigurdsdóttir, sosialráðgevi



Marner Simonsen, lækni



Turið Debes Hentze, logfrøðingur

Løgfrøðingurin:

Er loyvt at doypa ómyndug, uttan loyvi frá foreldrum ella avvarandi?

I familju mini er ein nú 19 ára gomul genta, sum varð doypt í eini samkomu, sum er komin hendaveg seinastu árini.

Hon var ikki 18 ár, tá hon varð doypt, og sostatt ómyndug.

Nú er tað eg vil vita, um ein slík samkoma hevur loyvi at doypa ómyndug fólk, sum ikki hava loyvi við heimanifrá frá foreldrum ella avvarandi.

Mær vitandi, so verður ein fólkakirkjulimur, sum vendir sær til aðra trúgv, koyrdur úr kirkjuni.

Til upplýsingar kann eg greiða frá, at gentan er bæði doypt og fermd í fólkakirkjuni.

Hvat hendur við samkomuni, um hon bleiv saksøkt?

kirkjufólk

Einhvor sum er undir 18 ár og ogiftur er undir foreldrarætti.

At foreldur hava foreldrarætt ella foreldramyndugleika yvir bornum teirra merkir, fyri tað fyrsta, at tey hava skyldu at taka sær av bornunum og syrgja fyri, at tey hava tað gott. Men foreldrarættur merkir hinvegin eisini, at foreldrini hava rætt at ráða yvir bornunum, og taka avgerðir teirra vegna — og er hesin rættur mestsum óavmarkaður.

So leingi barnið er undir 18 ár kunnu foreldrini (verjin ella tann sum hevur foreldrarættin) einsamøll gera av, hvar barnið skal bugva ella vera, til hvønn trúarbólk tað skal vera knýtt, um tað skal ganga í skúla ella arbeiða, hvar tað skal ganga í skúla, hvørjum klæðum tað skal ganga í, hvat tað skal eta, ella hvat annað ein annars kann hugsa sær, at foreldur kunnu krevja av barni teirra.

So hvørt sum barnið veksur, fær tað í størri og minni mun loyvi at ráða sær sjálvum, og man rættiliga vanlig hugsan í dag vera, at besta fyri bornini er, at tey í so stóran mun sum gjørligt ráða sær sjálvum.

Ósemju slepst tó neyvan undan av og á. Barnið ynskir t.d. at halda áfram við skúlagongdini, men foreldrini vilja heldur, at tað fer í vinnu. Í slíkum fori eru tað foreldrini, sum vinna juridiskt, og barnið kann ikki fáa nakran myndugleika t.d. at hjálpa sær mótvegis foreldrunum. Tey hava foreldrarættin, og hann er sterkur, juridiskt.

Spurningur tygara, um barnið hevur loyvi at lata seg doypa í einum øðrum trúarsamfelag enn tí, foreldrini eru í, uttan at foreldrini hava givið tí loyvi til tess, má svarast út frá tí, eg her havi nevnt um rættin hjá foreldrunum at ráða yvir bornum teirra.

Barnið (tann ómyndugi) átti ikki at latið seg doypt uttan at sagt foreldrunum frá ella spurt tey um loyvi. So mikið meiri kann ein siga, at tað trúarsamfelag, sum soleiðis skúgvar foreldrarættin til víks við at doypa ómyndug uttan fyrst at tryggja sær loyvi frá foreldrunum, hevur borið seg ósømiligt at, og serliga tá eisini verður hugsað um, at just tey ymisku trúarsamfelagini um okkara leiðir ofta leggja stóran dent á at styrkja familjuna.

Um viðkomandi samkoma hevur handla ólógligt kann eg ikki eintýdugt svara tygum, men haldi eg rætturin hevði avgjort málið eftir eini meting um foreldrarætt og um, hvørjar skyldur tann ómyndugi við dópinum hevur átikið sær — eg hugsi her serliga um fíggjarligar skyldur sum kunnu vera limagjald o.t.

Eftir er so spurningurin um, hvørja gleði tygum hovdu havt av at fingið viðhald í rættinum, um samkoman sum domd varð fyri ólógliga handling, framvegis metti dópin sum fullt gyldugan. Tá er ikki meiri tosan um rættarreglur, men um eina tvístøðu millum trúarbólkar, sum ikki kann loysast juridiskt.

At enda til tað tygum nevna um fólkakirkjulimir, sum venda sær til aðra trúgv, kann eg siga, at einhvør, sum er 15 ár og sum hevur foreldranna samtykki, kann melda seg úr fólkakirkjuni. Einhvør sum er myndugir kann til eina og hvørja tíð melda seg úr, og verður av fólkakirkjuni roknaður sum farin úr, um hann hevur vent sær til aðra trúgv, hóast formilig útmeldan ikki er vanlig, uttan at skrivlig umsókn er latin inn um hetta fyrst.

Turið

Læknin:

Er súreplaedik heilsubøtandi?

Herfyri tosaði eg við eina vinkonu, sum segði mær, at hon hvønn morgun fekk sær eitt glas av kókaðum vatni við eini súpuskeið av súreplaedik. Hetta hevði hon lisið, skuldi vera so gott fyri heilsuna.

Eg royndi eisini hetta beinanvegin, og eg haldi, at ein ernast av tí, men eisini, at hetta er vatndrívandi, tí eg skal oftari á vatnhúsið nú enn áður. Er tað nakar vandi við at drekka hetta, ella er tað heilsubøtandi bert nakað ein billar sær inn?

Kann læknin greiða frá hesum?

Vatnmaðurin

Súreplaedik er ein veik sýra, sum helst ikki hevur ávirkan á heilsuna.

Fyrr í tíðini var tað vanligt, at nýta súreplaedik, vinedik og annan edik, sum heiluvág — bæði útvortis og innvortis og eisini til at dubba á sár.

Súreplaedik er tó ikki hættislig at nýta saman við kókaðum vatni, tí hon er so mikið veik.

Tann sýran sum er í maganum er nógv sterkari enn edikasýran.

MS

Smá eistur

Eg eri ein 26 ára gamal drongur, sum havi livað saman við gentu míni í góð fýra ár.

Stóri trupulleiki mín er, at tað gongur ov skjótt, tá vit eru í song saman.

Eg havi smá eistur, — við hvørt nærum eingi. Eg kann merkja steinarnar við hvørt, men teir fara upp og niður.

H. P. R.

Ov skjót avgonga nýtist ikki at hava samband við stoddina av eistrunum.

Tað er vanligt fyribrigdi, at eistrini gliða niðan móti rorunum. Har situr ein voddi, sum lyftir eistrini upp, t.d. við kuldaávirkan og øðrum ávirkanum.

MS

Sálarfrøðingurin:

Sonur mín lýgur

Eg eri einsamøll mamma at 5 ára gomlum fittum og skilagóðum smádrongi, men í seinastuni eri eg farin at orogvast yvir, at hann er farin at lúgva. Ikki so at eg haldi hann hava tað fyri neyðini, tí ikki verður hann strangliga uppaldur, og hann tær stórt sæð tað, hann biður um.

Tað, sum mest órkymlar meg, er, at umframt at penta søgur saman fyri javnaldrunum um alt tað, vit fara at keypa okkum, eisini reypar um brøgd pápans, og hetta hóast hann ongantíð hevur vitað av einum slíkum.

Hvi ger drongurin hetta, hvussu skal eg fyrihalda meg?

Einsamøll mamma

Fyri tað fyrsta er tað eitt sindur órímuligt at tosa um lygn hjá einum barni, sum enn ikki er rokkið skúlaaldurin, tí framm til tá skilja tey ikki rættuliga millum fantasi og veruleika. Børn mugu læra veruleikan at kenna, áðrenn tey kunnu duga at handfara hann sum sannan ella ósannan, og fantasi og slíkt sum at penta saman søgur kann í veruleikanum vera eitt slag av spæli í barnagarðsaldri.

Hinvegin eigur ein at gáa eftir ósannindi hjá børnum, sum eru so mikið framkomin, at tey greitt skilja, nær tey lúgva og ikki, tí lygnin hevur nærum altíð eitt endamál.

Neyðlygnin er sostatt fyri so vítt væl skiljandi í t.d. einum strongum heimi við ótta fyri revsing, ella har børn kenna tørv á privatlívi í einum umhvørvi við ov stívum eftirliti.

Tað er eisini hugsandi, at børn kunnu taka við lygn eftir foreldrum og øðrum, sum sjálvi lúgva.

Alvarsamari er, um ósannindini eru grundaði á ein tørv at koma sær fram hjá t.d. einum barni, ið kennir seg sálarligan ella sosialan sakn, her kann tað fátæka barnið t.d. lúgva um alt, tað eigur heima, fyri ikki at víkja alt ov mikið frá øðrum børnum, eins og ungmenni, sum ikki er fyri erotiskum framburði, ofta hevur tað við at skrogga júst um egin brogd í so máta.

Tað kundi hugsast, at sonur tygara reypar um ein pápa, tí hann júst kennir sakt á einum slíkum, men eg haldi ikki, at tygum skulu missa svøvnin av hesum, tí sum áður nevnt er hann enn í árum, har fantari og veruleiki eru hvørt um annað, og hevur hann tygum og onnur góð fólk, helst av báðum kynum um seg, kundi saknurin av einum biologiskum pápa verið til at liva við.

Annars vildi eg mett at skroggið hjá soninum um ein pápa kundi verið eitt væl høskandi stoði til at tala við hann um veruleika hansara kring hetta evnið, men tað eigur at fara varisliga fram og helst bert við tí ferð, hann sjálvur spyr.

EyJo

um nøvn

25 ára kirkjuarbeiði

Gudrun Sørensen, organistur við Viðarreiðis kirkju, hevur 25. september í ár, verið organistur í 25 ár.

Í samband við 25 ára dagin, var hátíðarhald í kirkjuni á Viðarreiði, har kirkjufólkið heiðraði Gudrun Sørensen.

Til gávus frá kirkjufólkinum fekk Gudrun Sørensen handað eitt blómuglas, sum Poulina Joensen í Klaksvík hevur málað.

Øðrumegni er mynd av tí gamla orglinum í Viðarreiðis kirkju og hiðumegni mynd av tí nýggja.

Ein tekst er eisini á blómuglasinum, har stendur: Tøkk fyri 25 ára trúgva tænastu.

Gudrun Sørensen hevur spælt til gudstænastu hvønn sunnudag hesi 25 árini.

Rættleiðing

Tíverri er ein setifeilur komin í føðingardagsheilsuna til Arna Olsen, yvirlækna í týsdagsblaðnum.

Arni Olsen starvaðist á Tuberklasanatoriinum á Dronning Alexandrines hospital í Havn og í Klaksvík, til hann fyrst í fimtiárunum fór at virka sum kommunulækni í Vágunum, har hann varð verandi til hann seinast í fimtiárunum fór niður at útbúgva seg til serfrøðing í neurologi og sálarsjúkum.

Mia og Dia

Í handlarnar er komin nýggj lesibók Mia og Dia fyri børn í 1. flokki. Tað er Steinbjørn B. Jacobsen, sum hevur skrivað bókina, og Bárður Jákupsson hevur teknað.

Bókin er høskilig at fara undir um jóltíðir, tá børnini hava lært bókstavirnar og eitt ávist orðatilfar.

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út.

Lesibókin Mia og Dia kostar kr. 40,—.



Jazzfelagið

17. september: Salamander í Perluni
18. september: Salamander o. o. spæla í Perluni

Kvøldlot

16. september: Black Birds
17. september: Black Panters
18. september: Skandalan

Dallas

16. september: Jan Ove, plátuvendari
17. september: Bogi Kirke, plátuvendari
18. september: Niels Jensen, plátuvendari
19. september: Marner Joensen, plátuvendari